Kvinnudystir í kvøld

Upprunaliga var ætlanin, at fyrsta umfar í landskappingini í 1. deild hjá kvinnum skuldi spælast leygardagin, men av tí at kavi var á summum vallum, vóru allir tríggir dystirnir útsettir. Nú hevur kappingarnevndin hjá Fótbóltssambandinum so gjørt av, at teir verða spældir í dag í staðin. Dystirnir eru KÍ-EB/Streymur í Klaksvík, AB-Skála á Argjum og Víkingur-B68/NSÍ í Gøtu.

Buha av landinum

Blagoje Buha, sum síðstu seks árini hevur spælt við Neistanum, fer í summar aftur til Serbia, og tí verður hann ikki við í hópinum hjá Neistanum, sum í summar fer undir fyrireikingarnar til komandi kappingarár. 38 ára gamli serbin fer nú heimaftur eftir seks ár í Føroyum, skrivar heimasíðan hjá Neistanum.

Pál Joensen velur danska landsliðið

– Eg eri framvegis føroyingur og ikki danskari, sjálvt um eg í framtíðini skal umboða Danmark í altjóða kappingum, heldur enn Føroyar, sigur 18 ára gamli svimjarin úr Vági, Pál Joensen, ið her er avmyndaður í sambandi við venjing í Danmark fyri trimum vikum síðani

– Skal eg røkka mínum málum, eru umstøðurnar fyri víðari menning ikki til staðar í Føroyum. Tí eri eg noyddur at taka av tilboðnum um at svimja fyri Danmark, sigur 18 ára gamli svimjarin úr Vági, sum vil fylgja dreyminum um OL-gull í London í 2012

SVIMJING

Hilmar Jan Hansen
fyrsti@apríl.fo

Nú danska svimjisambandið hevur valt at strikað øll donsk met, sum Pál Joensen hevur sett, fær tað ikki ta stóru ávirkanina á víðari svimjileiðina hjá unga vágbinginum. Longu í næstu viku skal hann til Danish Open-kappingina í Esbjerg, har hann lættliga kann seta øll metini av nýggjum.

Orsøkin er, at nú lýkur Pál Joensen tær treytir, danska svimjisambandið hevur sett, um hansara met skulu verða góðkend sum donsk met. Pál hevur nevniliga tikið eina tunga, men leingi umhugsaða, avgerð: Hann fer nú at umboða Danmark í altjóða kappingum og svimja á danska landsliðnum.

– Eg havi onkuntíð fyrr sagt, at eg eri ikki danskari, men føroyingur, og tað er framvegis galdandi, fyri tað um tað stendur Danmark aftan fyri mítt navn á met- og úrslitalistunum. Tað ger tað longu allíkavæl, so fyri meg kann tað gera tað sama, sigur 18 ára gamli Pál Joensen.

– Nú danska svimjisambandið hevur spurt meg, um eg vil svimja fyri Danmark, fái eg ikki sagt nei, tí tað stendur mær greitt, at skal eg røkka mínum málum, eru umstøðurnar fyri víðari menning ikki til staðar í Føroyum. Eg kann ikki blíva við at venja í einum stuttum hyli í Vági, tá allar tær stóru kappingarnar eru í 50 metra longum hyljum úti í Europa.

Samstundis letur Pál skilja á lagnum, at hann er sera vónbrotin av føroysku politikarunum, ið ikki geva svimjingini ans, tí einki røkist fyri, at ein føroyskur hylur, ið kann brúkast til venjing og altjóða kapping, er í ljósmála næstu mongu árini.

Endar í Esbjerg

Í gjár bóru vit tey tíðindi, at føroyskir og grønlendskir svimjarar ikki longur kunnu fáa síni met skrásett sum donsk met, uttan so at teir gevast at svimja fyri ávikavist føroyska og grønlendska svimjilandsliðið, men í staðin svimja á danska landsliðnum og umboða Danmark í altjóða kappingum.

– Míni fremstu mál hava higartil verið EM- og HM-kappingar, men sum allir teir, eg kappist við í altjóða kappingum, droymi eg eisini um OL. Tá olympisku leikirnir eru í London í 2012, havi eg sum danskur landsliðssvimjari møguleika at kappast við teir har eisini, og eg vil fegin fylgja dreyminum um at vinna olympiskt gull, sigur Pál Joensen, sum samstundis gevst við samstarvinum, hann í fleiri ár hevur havt við Jón Bjarnason, høvuðsvenjara hjá Suðuroyar Svimjifelag.

– Tað liggur einki persónligt í tí, tí Jón hevur verið mín størsti stuðul og er ein fantastiskur venjari, og hann stuðlar mær eisini í avgerðini um at taka av tilboðnum um at koma á danska svimjilandsliðið. Men av tí at eg skal til Esbjerg at svimja við sama felag sum Elspa Mørkøre, West Swim, verður tað Bo Jacobsen, sum verður nýggjur venjari hjá mær.

Hesin Bo Jacobsen er ikki hvør sum helst, tí hann er beiggi fleirfaldað europa- og heimsmeistaran, Mette Jacobsen, sum hann vandi øll árini. Felagið í Esbjerg fær í dag, sum er evstamark fyri flyting, fyribils váttan um svimjiloyvið hjá Pál Joensen, sum tó ikki umboðar West Swim í kapping fyrr enn um ein mánað.

– Í næstu og aðru viku fari eg at umboða Aalborg Svømmeklub, og eftir tað kemur so svimjiloyvið hjá mær til felagið í Esbjerg, sum eg komi at umboða nakrar ferðir fram til síðst í juni, tá skúlin er liðugur og eg kann flyta til Danmarkar, sigur Pál Joensen, sum sostatt avskrivar møguleikan fyri at umboða Føroyar á komandi Oyggjaleikunum á Álandi.

Calderwood aftur tøkur hjá Føroyum

Alt bendir á, at Alan Shearer tekur yvir sum fyribils manager í Newcastle. Tað kann so eisini merkja, at Colin Calderwood av nýggjum er tøkur sum landsliðsvenjari hjá Føroyum, eftir at hann fyrst í februar mánaði bara var undirskriftina frá starvinum

FÓTBÓLTUR

Hilmar Jan Hansen
einslistir@kallnet.fo

Eftir frálíka úrslitið hjá fótbóltslandsliðnum í Íslandi fyri hálvariaðru viku síðani hava gitingar verið um, at Fótbóltssambandið fór at seta Heðin Askham sum nýggjan A-landsliðsvenjara. Hann skuldi bara taka sær av tí eina dystinum ímóti Íslandi, og hevur júst longt sáttmálan sum venjari hjá U21-landsliðnum.

Higartil hevur eingin í Fótbóltssambandinum váttað, at ætlanin var at lata Heðin hava ábyrgdina av A-landsliðnum meira enn henda eina dystin, og FSF-forsetin, Høgni í Stórustovu, hevur áður sagt, at farið er undir alla tilgongdina við landsliðsvenjarastarvinum av nýggjum.

– Vit endurmeta tilgongdina og hava fyribils lagt eina ostaklokku út yvir alt málið. Vit fara at halda kortini tættari at kroppinum nú, og tá sáttmáli skal gerast við komandi landsliðsvenjara, skal hann koma sum ketta upp úr høvdatrogi, segði Høgni í Stórustovu fyri einum góðum mánaði síðani.

Orsøkin til tað er ivaleyst, at Sosialurin í januar mánaði avdúkaði, at Fótbóltssambandið hevði tríggjar venjarar í at velja: Danskaran Flemming Serritslev, íslendska serban Luka Kostic og skotan Colin Calderwood, harav tann síðsti helst var »heitasta« evnið.

Kanska tøkur aftur

Fótbóltssambandið ætlaði at seta starvið fyrst í februar, men brádliga steðgaði alt upp, hóast bara undirskriftin segðist resta í. Nógv bendi tá á, at tað var undirskriftina hjá Colin Calderwood, talan var um.

Calderwood var beint frammanundan komin til Newcastle, har hann stutt eftir tók við besta liðnum saman við Chris Houghton, eftir at Joe Kinnear varð sjúkrameldaður við hjartatrupulleikum. Gongdin hevur tó ikki verið nakað serlig, og nú sær út til, at Calderwood og Houghton ikki longur varðveita ábyrgdina av Premier League-liðnum hjá Newcastle.

Nú ljóðar fyri vist, at Alan Shearer, sum helst er størsta lokala hetjan hjá Newcastle í nýggjari tíð, skal halda manager-stólin heitan, til Joe Kinnear er komin fyri seg aftur.

At tilknýtið hjá Colin Calderwood til Newcastle tí kann væntast at gerast munandi leysari, enn tað hevur verið, kann lata upp fyri, at Fótbóltssambandið aftur hyggur nærri at »skotsku loysnini«.

Colin Calderwood er møguliga tøkur aftur sum landsliðsvenjari hjá Føroyum, nú alt bendir á, at Alan Shearer yvirtekur uppgávur hansara í sambandi við Premier League-liðið hjá Newcastle